Til Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina
100 Tórshavn

Nevndin í Føroya Fiskimannafelagi heitir á Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina um, at mæla landsstýrinum til at taka 30 daga regluna og 60 daga regluna hjá fiskimonnum upp av nýggjum, umframt at útrokningargrundarlagið verður broytt.

Talan er um ásetingar nevndar í § 20a, stk. 1 í ALS-lógini, sum í løtuni er orðað soleiðis:

> *"Fyri fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og sum verða løgd vegna umvælingar, verður arbeiðsloysisstuðul goldin eftir 30 dagar, frá tí at skipið varð lagt, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum."*

30 daga reglan
Talan er um ásetingina um nær fiskimenn kunnu koma upp í arbeiðsloysisskipanina. Vit halda, at dagatalið, sum fiskimenn skulu bíða, til teir sleppa upp í ALS-skipanina, er ov long. Í dag skulu fiskimenn bíða í heilar 30 dagar til teir fáa ALS-útgjald. Vit halda, at henda áseting skal broytast soleiðis, at fiskimenn skulu bíða 15 dagar til teir fáa ALS-útgjald. (sí § 20a, stk. 1, nr. 1)

60 daga reglan
Talan er um ásetingina um, hvussu leingi goldið verður út. Vit halda, at talið av útgjaldsdøgnum er ov stutt. Í dag verður í mesta lagi goldið fyri 60 útgjaldsdagar. Vit halda, at henda áseting skal broytast soleiðis, at tað í mesta lagi verður goldið fyri 90 útgjaldsdagar. (sí § 20a, stk. 1, nr. 2)

Útrokningargrundarlagið
Talan er um ásetingina um, at fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum. Vit halda, at henda áseting skal broytast soleiðis at hon, við neyðugum tillagingum, í mest møguligan mun kemur at fylgja ásetingunum í § 15 og § 16 í ALS-lógini. (sí § 20a, stk. 1, nr. 3)

Dagføring av kunngerð
Verður broyting av § 20a í ALS-lógini framd, má núgaldandi Kunngerð nr. 101 frá 20. juli 2009 um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar, dagførast. Her verður serliga hugsað um § 5.

Grundgeving
Sum yvirlitið frá ALS umsitingini, vísir, so hevur skipanin ikki útgoldið nógvar pengar til fiskimenn síðan 2015.

LM-110/2024

Fyri alt tíðarskeiðið frá 2015 til og við 2020 hevur ALS tilsamans útgoldið 83.253 kr. til 41 fiskimenn.

Ár	Tal av persónum	Samlað tímatal	Samlað útgjald
2015	8	117	924
2016	11	912	37.956
2017	1	72	5.316
2018	6	144	4.601
2019	5	104	4.675
2020	10	1.050	29.783
Ialt	41	2.399	83.253

ALS umsitingin hevur upplýst fyri Fiskimannafelagnum, at ongar umsóknir eru komnar frá fiskimonnum fyri árini 2021, 2022 og 2023.

Nevndu broytingar gera, at fiskimenn koma 15 dagar fyrr upp í skipanina og fáa útgjald 30 dagar longri, umframt at útrokningargrundarlagið verður dagført.

Broytingin kollveltir ikki ALS fíggjarliga, meta vit.

Vísandi til lágu útgjøldini til fiskimenn frá 2015 til 2023 kann ALS-stýrið vónandi ganga fiskimonnum hesum á møti við at mæla Landsstýrinum til, at leggja fram lógarbroyting í ALS-lógini sambært omanfyrinevnda.

Bryggjubakki tann 18. September

Nevndin í Føroya Fiskimannafelag

Jan Højgaard, form.

Sámal Poulsen, næstform Sniálvur Røvilsberg

Hans Vilhelm Danielsen Per á Sýnini Sólberg Olsen Magnus Pauli Glerfoss

LM-110/2024